## 200 fólk á fundi í Hvannasundi

Í morgin verður fólkaatkvøða í Hvannasunds kommunu við spurninginum um leggjast skal saman í ta stóru Norðoya Kommuna. Til tess at kunna fólkið um málið er ein faldari sendur út í hvørt hús, eins og ein borgarafundur varð hildin í gjárkvøldið. Líkt er til at málið hevur stóran áhuga, tí úti ímóti 200 fólkum møttu upp til fundin. Fundurin byrjaði klokkan sjey og endaði ikki fyrrenn hon var farin av 10.



## Skótarnir í Leirvík byrja nú aftur

Skótalið Leirvíks Páls byrjar nú aftur sítt virksemi. Byrjað verður við einum úlvaliði og einum skótaliði. Úlvaliðið er fyri gentur og dreingir í 2.-4. flokki. Teirra fyrsti fundur verður í kvøld 19. Skótaliðið er fyri gentur og dreingir í 5.-7. flokki. Fyrsti fundur hjá skótunum verður mikukvøldið kl. 19. Tey, sum vilja vera úlvar ella skótar, kunnu tekna seg við at møta upp til fundirnar í Skótahúsinum, verður sagt úr Leirvík.

# Eingin spyr eftir Sjálvstýrisflokkinum

**- Síðan løgmaður segði samstarvið við Tjóðveldi upp í gjár, havi eg spurt løgmann, hvussu er við avtaluni millum Sjálvsstýrisflokkin og samgonguna, men løgmaður hevur svarað, at tað veit hann ikki. Hetta er heilt margháttligt, tá avtalan skuldi byggja á samstarv og álit millum partarnar, sigur Kári P. Højgaard, formaður Sjálvsstýrisfloksins**

POLITIKKUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Man kennur seg í løtuni sum í einum fótbóltsdysti, har tú situr á beinkinum og bíðar eftir at vera innskiftur. Men tað gongur ógvuliga trupult at vera settur á liðið.



*- Vit vildu vera við til at skapa politiskan stabilitet í landinum, sigur Kári P. Højgaard*

Tað sigur Kári P. Højgaard um poltisku støðuna, nú løgmaður hevur sett Tjóðveldinum stólin fyri hurðina.

- Eg upplivi støðuna soleiðis, at hin 12. august var avtala undirskrivað millum Sjálvstýrisflokkin og samgonguna fyri opnum skermi, sum alt Føroya fólk var vitni til. Avtalan bygdi á sínámillum álit og samstarv, sum hevði til endamála at loysa stór mál, sum samgongan hevur sett sær fyri, og sum Sjálvsstýrisflokkurin kundi taka undir við. Aftrat hesum høvdu vit okkara løglista og okkara valskrá, sum part av hesi avtalu.

Kári vísir á, at blekkið var nóg illa tornað, tá fyrsta stríðið tók seg upp, og Tjóðveldi fór í einarúm av viðgera innanhýsisstøðuna, tí semja ikki fekst í flokkinum um fiskidagar.

- Stutt eftir fór løgmaður í samráðingar við tveir aðrar flokkar, Fólkaflokkin og Sambandsflokkin, men hesar samráðingar førdu so ikki á mál. Alt hetta hendi, hóast Sjálvsstýrisflokkurin hevur hildið gjørdu avtaluna út í æsir.

### Visti einki

Formaðurin sigur, at nú ótraditionella og nýskapandi samstarvið millum samgongu og Sjálvsstýrisflokkin kundi komið í gongd – í fyrsta lagi við at fáa fíggjarlógina fyri 2009 lagda fyri tingið, koyrir løgmaður Tjóðveldi úr samgonguni.

- Eg visti av ongum og fekk boðini frá løgmanni beint fyri tíðindafundin klokkan 15 í gjár.

Kári P. Højgaard sigur, at meðan Sjálvsstýrisflokkurin hevur verið stuðulsflokkur, hevur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, havt flokkin við til kunningar um støðuna á sínum øki, og síðan hevur landsstýrismaður Miðfloksins í fíggjarmálum, Karsten Hansen, havt flokkin til kunningar um skerjingar av blokkinum upp á 117,5 miljónir krónur.

- Annars hava vit onga kunning fingið og einki samskifti hevur verið um nakað sum helst, sigur hann.

Formaðurin sigur, at hann síðan uppsøgnina hjá løgmanni hevur spurt Jóannes Eidesgaard, hvar Sjálvsstýrisflokkurin er endaður í øllum hesum við atliti til gjørdu avtaluna við samgonguna.

- Løgmaður hevur svarað, at tað veit hann ikki, og nú prát hevur verið millum Javnaðarflokkin, Fólkaflokkin og Sambandsflokkin um møguleikar fyri nýggjari samgongu, er Sjálvsstýrisflokkurin slett ikki kontaktaður og hevur einki tilboð fingið um nakað sum helst, sigur Kári sum heldur, at løgmaður hóskandi átti at sagt avtaluna við Sjálvsstýrisflokkin upp, áðrenn hann fór í samráðingar við aðrar flokkar.

Hann heldur, at tað, sum er hent, er rættiliga margháttligt, tá avtalan flokkana millum skuldi byggja á álit og samstarv.

### Vildu ikki uppí

Kári P. Højgaard sigur, at orsøkin til, at Sjálvsstýrisflokkurin ikki vildi fara beinleiðis upp í samgonguna, var, at tíðin síðan samgongan varð skipað hevur verið rættiliga turbulent.

- Vit vildu gjarna vera við til at skapa politiskan stabilitet í landinum, men vit vildu ikki draga henda turbulent, sum Føroya fólk hevur verið vitni til, inn í Sjálvsstýrisflokkin, sigur formaðurin, sum annars heldur, at tað hevði verið stór skomm mótvegis Føroya fólki, um landið longu aftur skuldi verið kastað út í eitt valstríð.

# Javnaðarflokkurin úr einari koyggju í aðra

**- Tað verður ikki lætt hjá Javnaðarflokkinum at fáa í lag samgongu við Fólkaflokkin og Sambandsflokkin nú, tá tað ikki eydnaðist í februar. Eg haldi, at Javnaðarflokkurin hevur kastað alt trúvirðið fyri borð, nú teir rekast úr einari koyggju í aðra, sigur Jenis av Rana, formaður Miðfloksins**

POLITIKKUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Jenis av Rana er ikki so sannførdur um, at tað fer at eydnast løgmanni at fáa í lag eina breiða tríflokkasamgongu millum Javnaðarflokkin, Fólkaflokkin og Sambandsflokkin.

- Tá løgmaður ikki megnaði hetta í februar, tí hann ikki kundi svølgja krøvini hjá hinum báðum flokkunum, ivist eg onga løtu í, at krøvini hjá Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum eru enn størri í dag eftir miseydnaðu royndina hjá Javnaðarflokkinum saman við Tjóðveldinum. Men nú fáa vit at síggja, hvussu leikur fer.

Jenis av Rana heldur, at Javnaðarflokkurin hevur kastað alt trúvirði fyri borð, nú flokkurin síðan løgtingsvalið í januar hevur rikist úr einari koyggju í aðra, sum hann tekur til.

- Tað boðar ikki frá politiskum stabiliteti, at Javnaðarflokkurin nú fer aftur til teir flokkar, sum hann vrakaði fyrst í árinum.

### Ikki sannførdur

Formaður Miðfloksins sigur, at nógv prát hevur verið og er millum flokkar, síðan løgmaður gjørdi av at tveita Tjóðveldi úr samgonguni, og hann sigur seg slett ikki vera so vísan í, at tær samráðingar, sum nú eru millum Javnaðarflokkin, Fólkaflokkin og Sambandsflokkin, fara at føra á mál.

- Tað verður forhandlað í eyst og vest, sum Jenis av Rana tekur til.

Floksformaðurin sigur, at Miðflokkurin er ikki boðsendur til samrøðurnar, sum í gjár og í dag hava verið millum teir tríggjar flokkarnar, men kortini er hann ikki so fullvísur í, at Miðflokkurin ikki verður við, um hetta verður samgongan.

- Vit eru opnir fyri øllum møguleikum og so leingi, sum eingin nýggjur fíggjarmálaráðharri er valdur, verður landsstýrismaðurin hjá okkum, Karsten Hansen, sitandi. Onkur skal jú ansa fíggjarmálum, og okkara maður er tøkur til tess, um flokkar semjast, og boð verða eftir okkara fólki, sigur hann.



*- Vit eru opnir fyri øllum møguleikum, sigur formaður Miðfloksins, Jenis av Rana*

### Allir aktivir

Jenis av Rana sigur, at soleiðis, sum fjølmiðlarnir føra fram politisku støðuna, ljóðar tað, sum um tað bara er Javnaðarflokkurin, ið er aktivur.

- Men tað er ikki rætt. Allir flokkar eru aktivir, og sum eg nevndi verður nógv prátað aftur og fram, bæði á skipaðum fundum og í krókunum, sigur formaður Miðfloksins.